# LIGGJA VÆL FYRI Í BÚSKAPARLIGARI FRAMGONGD

**FAROEXPO** – Í hørðu og náðileysu náttúruni uppi í Atlantarhavinum hava føroyingar lært at liva. Vit hava lært at navigera í ringum sjógvi, og vit hava lært at laga okkum til skiftandi búskaparligar veruleikar, segði løgmaður, Kaj Leo Johannesen, tá hann setti FaroExpo í Runavík týsmorgunin. Løgmaður kundi eisini vísa á eina búskaparliga framgongd – fyri árið í ár og væntandi eina enn størri framgongd fyri komandi ár

**Vinnulív og mentan kunnu fáa stórt gagn av hvørjum øðrum, um partarnir duga at samstarva...**
LØGMAÐUR


*– Saman kunnu vinna og mentan skapa málini, sum nógv søluátøk eru dømi um, segði løgmaður, Kaj Leo Johannesen, tá hann setti FaroExpo týsmorgunin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Petur Olivar í Hoyvík (Gimpe) var frásøgumaður undir setanini, og Rannvá Troest var millum álitisfólkini aftanfyri diskin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Hallur Joensen og Kristina Bærentsen settu sín dám á setanina av FaroExpo, og millum sangirnar var "Gyltu ljósakrúnurnar"*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vilmund Jacobsen

Tað var løgmaður, Kaj Leo Johannesen, sum týsmorgunin setti vinnustevnuna FaroExpo í Ítróttarhøllini í Runavík.

Løgmaður takkaði fyrireikarunum fyri møguleikan, tey við hesum geva føroyskum og útlendskum vinnulívsfólki at hittast og vísa fram sínar vørur, eins og høvi er at geva av sínari vitan og royndum.

Hann nevndi heimsumfatandi figgjarkreppuna og segði, at hóast hesa, er FaroExpo kortini eitt prógv um, at samfelagshjólini mala víðari, og at arbeiðssemi, kreativiteturin og ágrýtni ikki eru burtur, men framvegis eru í hásæti.

### Vøkstur í búskapi

Kaj Leo Johannesen vísti á lyklatøl, sum benda á, at búskaparliga afturgongdin er vend til framgongd, og at Føroyar í ár kunnu vænta sær ein búskaparligan vøkstur á 3 prosent – eins og ein vøkstur á 5 prosent í 2011.

– Hetta er ein vøkstur, sum liggur í tí betra endanum millum evropeisku londini.

Løgmaður segði, at føroyingar gjøgnum tíðirnar hava lært at liva undir ymiskum og skiftandi umstøðum í tí hørðu og náðileysu náttúruni